**Heystfundur Sambandsflokksins 2005**

Árligi heystfundur Sambandsflokksins verður á Hotel Hafnia leygardagin 29. oktober kl. 10.00

*Øll sambandsfólk eru vælkomin*

Sambandsflokkurin

Sosialurin

P/F ALMA Munters

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondenstrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00
Mail: henrik@alma.fo



**Jólapostur 2005**

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í Tórshavn:

| | Flogpostur | | Skipspostur | |
|---|---|---|---|---|
| | Brøv | Pakkar | Brøv | Pakkar |
| Bretland | 16.12 | 15.12 | 01.12 | 01.12 |
| Danmørk | 19.12 | 19.12 | 15.12 | 15.12 |
| Finnland | 16.12 | 16.12 | 08.12 | 08.12 |
| Grønland, Nuuk | 16.12 | 16.12 | 17.11 | 17.11 |
| Ísland | 16.12 | 16.12 | senda ikki við skipi | |
| Noreg | 19.12 | 12.12 | 08.12 | 08.12 |
| Svøríki | 16.12 | 16.12 | 08.12 | 08.12 |

Freistirnar eru eisini at síggja á www.postur.fo

Upplýsingar um seinastu freistir til onnur lond og nærri upplýsingar um freistirnar til aðrar býir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum

Innlendis

Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi mikudagin 21. desember

Tollgreiðsla

Tað er sera umráðandi fyri skjóta tollgreiðslu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldið (gávurnar) í sendingunum verður skrivliga útgreina á tollsegnina

Matvøra

Avmarkingar eru tá matvøra skal sendast til útheimin. Upplýsingar eru at fáa á posthúsunum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjum pakka

Tilskriftarleysar sendingar í desember

Tilskriftarleysar sendingar kunnu sendast uttan eykakostnað. Gjøldini og vanligu reglurnar eru at finna á www.postur.fo

Veðrið kann darva postflutningin. Sendið tí postin í góðari tíð

Postverk Føroya ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Postverk Føroya

Ivan Johansen Bilar:

# Staðfest góðskustøðið hjá Ivan Johansen Bilum

**Ivan Johansen Bilar er framhaldandi einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum. Fríggjadagin 14. oktober 2005 var Det Norske Veritas (DNV) á gátt hjá Ivan Johansen Bilum fyri at eftirkanna og gjøgnumganga góðskuskipanina**




TÍÐINDASKRIV

Tá starvsfólk saman við umboðnum hjá DNV høvdu gjøgnumgingið skipanina í slakar 8 tímar, kundi staðfestast at góðskustøðið er framhaldandi verður hildið hjá einastu ISO góðkendu bilasøluni í landinum, og at henda enntá er hækkandi á fleiri økjum.

### Árliga certifiseringin

Sum partur av DS/EN ISO 9001:2000 góðskuskipanini hjá Ivan Johansen Bilum skal ein árlig gjøgnumgongd av skipanini gerast minst einaferð árliga. Henda var sum áður nevnt fríggjadagin 14. oktober 2005.

Tað er altíð ein spennandi og ikki sørt gevandi dagur, tá góðskuskipanin verður gjøgnumgingin. Hetta setur krøv bæði til starvsfólk og fyritøkuna sjálva, og kemur í síðsta enda viðskiftafólkunum til góðar. Úrslitið av certifiseringini vísti heilt greitt, at Ivan Johansen Bilar nýtir góðskuskipanina í gerandisdegnum, og at hetta speglast aftur í teimum mannagongdum, sum eru galdandi.

### ISO skipanin - eitt amboð

DS/EN ISO 9001:2000 skipanin er eitt amboð - heldur enn bert ein skipan í sær sjálvum. Velur leiðsla og starvsfólk ikki at nýta hetta amboðið, so er skipanin sum so als einki verd fyri fyritøkuna. Skipanin er soleiðis skipað, at kravið er at dagføringar og mannagongdir verða regluliga gjøgnumgingnar, fyri t.d at staðfesta:

- Møguligar veikleikar.
- Um góðskustøði verður hildið.
- Um skipanin kann gerast meira einføld.
- Um skipanin verður nýtt aktivt í gerandisdegnum.

Við einari slíkari skipan í hondini eru mannagongdirnar lýstar út í æsir, men tað er ikki eins týðandi við, at ymiskt kemur fyri, sum ikki er nøktandi, men styrkin er hinvegin, at greiðar mannagongdir eru galdandi á øllum økjum, og tí er rættiliga stuttur vegur at finna loysnir, sum allir partar kunnu vera nøgdir við.

Týdning fyri leiðslu, starvsfólk og viðskiftafólk

Tað er eingin ivi um, at ISO skipanin hevur týdning bæði fyri leiðslu, starvsfólk og okkara viðskiftafólk. Leiðsla og starvsfólk eru sjálvandi áhugað í skipaðum viðurskiftum - og viðskiftafólkini eru kundar hjá einari fyritøku sum nýtir góðskustøði sum ein avgerandi "lykil" í kundasamskiftinum.

Hetta setur krøv, men við krøvunum fylgja úrslit - og tað ger so heldur einki um kundin hevur tað trygdina, at tænasta og góðska eru í hásæti, har bilurin verður keyptur.

# 140 føroyingar á legu í Danmark

**Kristnastova hevur skipað fyri legum á hvørjum ári síðani í 1976, og áhugin fyri at taka lut er framvegis stórur**

ÚTISETALEGA

*Jóannes Hansen*

Í hesi vikuni hava skúlarnir í Danmark havt heystfrí. Nú er heystfrítíðin í Danmark í vikuni eftir, at hon hevur verið í Føroyum. Fyri nøkrum árum síðani vóru heystfrítíðirnar í Føroyum og Danmark í somu viku. Og inntil fyri einum fimtan árum síðani var tað soleiðis, at heystfrítíðin í Danmark var í vikuni frammanundan, at skúlarnir í Føroyum høvdu heystfrítíð.

Síðani í 1976 hevur Kristnastova í Keypmannahavn bjóðað til legur. Hetta er sostatt 30. árið, at legur av hesum slagnum verða fyriskipaðar, Tey fyrstu árini vóru legurnar um várið og okkurt árið bæði á vári og heysti, men seinastu meiri enn tjúgu árini hava legurnar verið í heystfrítíðini.

Soleiðis er tað eisini í ár. Útisetalegan hjá Kristnastovu er í hesum vikuskiftinum. Tey hittust hóskvøldið, og tey halda á inntil á middegi í morgin. Áhugin at taka lut er stórur. Umleið 140 høvdu boðað frá luttøku á hesi leguni.

Talan er um nógvar barnafamiljur. Harafturat eru nógvir luttakarar ungfólk, sum eru í Danmark í lestrarørindum, og so eru tað útisetar, sum arbeiða og kanska hava sett búgv í Danmark.

Á skránni eru tiltøk fyri bæði børn og tilkomin og til gaman og álvara. Klæmint Eliasen, sum býr í Fuglafirði, er farin til Danmarkar at undirvísa, og fleiri føroyingar eru farnir niður at hjálpa til við matgerðini. Tað sigur seg sjálvt, at matarlepin er eyðkendur av, at tað eru føroyingar, sum matgjørt verður fyri.

Legan er hesa ferð í Nordsjællands Efterskole, sum er tætt við Helsinge. Har hevur legan verið trý tey seinastu árini. Áður hava legur verið á fleiri øðrum støðum á Sjællandi. Fyrsta legan var í Kongelejrinum við Sejrø bugt og nakað sunnanfyri Nykøbing Sjælland 6. til 8. februar í 1976, og onnur legupláss hava verið eitt nú Kikhavn við Hundested og í Høve.

Tað er samkoman í Kristnastovu, sum hevur boðið til legu. Út frá Kristnastovu arbeiða tvey føroysk trúboðarapør. Tey eru Susan og Øssur Berghamar og Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi.